3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

Moby

Play

Innan techno og dance stílin er Moby ein av avgjørdu oddamonnunum. Hann hevur verið við á hesum økinum rættiliga leingi, og tað er einki sum bendir á at hann er til reiðar at læta sessin, sum ein av undangongumonnunum á dagsins elektroniska tónleikapalli frá sær.

Um lurta verður eftir nýggju útgávuni Play, so er okkurt sum far tankarnar at venda sær ímóti einum ávísum Fat Boy Slim, og hansara stórseljandi dance tónleiki.

Eins og Fatboy Slim gjørdi við eitt nú lagnum Praise, so hevur Moby eisini verið og leita millum gamlar gospel og bluestekstir eftir einstøkum linjum sum hóska seg til hansara nýtímans tónleik, har hann kryddrar gamlar kendar tekstlinjur við nútímans stevi og og samplingum, og síðani borðreiðir við einum rætti sum er sera væl hóskandi til dansigólvið.

Nokkso fitt hevur verið at hoyrt til Moby síðan henda útgávan sá dagsins ljós. Serliga er tað lagið Natural Blues sum hevur bitið seg fast. Har løgna røddin hjá Moby nærum messar seg gjøgnum lagið. Antin elskar tú tað ella hatar tú tað av fullum hjarta. Eisini lagið Machete, far tankarnar at leita aftureftir, her er tað óiva lagið, I Robot, hjá Alan Parsons Project, sum hevur verið fyrimyndin, tó uttan at ljóða sum nøkur beinleiðis eftirgerð. Eisini lagið Honey hevur uppiborðið at vera nevnt sum eitt av teimum berandi á hesi útgávuni.

Sigast má um Moby, at hann er ein sera dugnaligur tónleikari og samplari. Tað seinna, um tað ikki er at ganga tøknini ov nær. Hann megnar við allari sínari nútímans tøkni at skapa soniskar og stundum rættuliga áhugaverdar ljóðmyndir. Ert tú garvaður rokkari ella okkurt annað, ið hellur á tann bógvin, so skal eitt sindur av dirvi til at ogna sær hesa útgávuna, men hevur tú hinvegin hug at royna nakað nýtt, so er Moby avgjørt ein virðilig byrjan uppá tína tónlistarligu rannsóknarferð. Og hvør veit um ikki fleiri nøvn innan somu genru ikki bara liggja har og bíða til tú skalt fáa eyguni upp fyri teimum



Pearl Jam

Binaural

Nei, eg eri ikki nakar tunglyntur grungari! - tað er ikki tí at Pearl Jam hava funnið vegin fram til hesa spaltuna. Men eg noyðist at viðganga, at eg havi ein veikleika fyri pátikna tunglyndinum hjá Eddie Vedder, og hinum úr Pearl Jam. Ein veikleiki sum hevur fylgt mær líka síðani framúrskarandi fyrstuútgávuna Ten.

Pearl Jam hava líkað síðan teir komu fram, havt stóra gleði av at vera í ringum lag, og taka synd í sær sjálvum, og í so máta er lítið broytt á teirra nýggju útgávu Binaural. Tað kann sigast nógv um Pearl Jam og teirra veruméta sum sum halda vera løgnan og eftirgjørdan, men mótvegis nógvum hinum av bólkunum í hava sín uppruna í grunge bylgjuni sum floymdi úr Seattle fyrst í nýtiárunum, so eru Pearl Jam framvegis livandi, teir spæla enn, og einki er sum bendir á at teir renna út og inn av viðgerarstovnum millum konsertferðirnar

Nýggja útgávan hjá Pearl Jam er ikki heilt ólík teimum undanfarnu, so dámar tær ikki til tær undanfarnu, er ikki nógv at heinta á hesari heldur. Um nakað, so er henda ein tonn tyngri, enn tær undanfarnu, at koma til sættis við. Lagt verður út við lagnum Breakerfall. Talan er um larmandi rokk, sum ikki segði mær tað heilt stóra at byrja við, men sum nú eftir at hava verið undir geislanum nakrar ferðir, hevur voksið seg stóran.

Betri er við næstu skering, God´s Dice sum kennist eitt sindur meira lurtaravinarlig. Henni á baki kemur stór rokkandi Evacuation, sum gevur lurtarnum hug at trampa í gólvið og skrála við. Sjálvt um tað ikki er serliga grunge. Men hvat? vit liva í eini postgrunge tíð.

Løgini sum hava bestan møguleika fyri at festa seg í minnið hja lurtaranum, eru uttan iva Nothing As It Seems, Thin Air, Light Years og Insignificance, sum øll hava tað sum skal til fyri at blíva Pearl Jam klassikarar. Eftir at hava hoyrt fløguna ígjøgnum einar fimtan ferðir, má sigast at hon veksir fyri hvørja ferð. Avgjørt eitt avrik í Pearl Jam kunnu kennast við, eisini fleiri ár fram í tíðina. Sum eitt lítið kuriosum kann nevnast at Pearl Jam í summar vera at hoyra á Roskilde Festivalinum, har nógvir føroyingar óivað vera at finna.



Whitney Houston

Gratest Hits

Um somu tíð sum amerikanska plátufelagið Arista Records heldur 25. ára stovningardag sín, er Whitney Houston klár við eini útgávu, sum ger status yvir hennara yrkisleið, sum skríggjandi soul diva við trongd til stimbrandi evnir. Hetta seinna er um man velur at trúgva tí, sum amerikonsk slaturbløð skriva um songkvinnuna, sum ikki hevur verið serliga virkin tey seinastu árini.

Ikki færri enn 35 skeringar eru á hesum báðum fløgunum, sum mynda útgávuna. Sjálvt um nógv av teimum kendu løgunum eru tikin við á hesa útgávuna, so er tað framvegis nógv, ið mangla Ein tendensur, sum er farin at gera um seg í samband við Greatest Hits útgávur er, at alt ov nógv nýggj løg, ella løg ið ikki hava verið útgivin fyrr vera tikin við. Hetta verður sjálvandi gjørt fyri at fáa útgávurnar meiri áhugaverdar fyri fjeppararar ið longu hava øll tey kendu løgini.

Tað sum hinvegin er spell er at tey sum veruliga vænta sær eina sonenvda greatest hits útgávu, vera snýtt, tí at løgini tey høvdu væntað at hoyrt, fyri ein part slett ikki eru tikin við. Hetta er ein rættuliga sjónligur feilur við hesi útgávuni hjá Whitney Houston, sum í alt ov stóran mun er merkt av nýggjum tilfari, og endurvevjingum (remix) av eldri løgum. Hesar endurvevjingar kunnu fyri ein part vera sjarmerandi, men í longdini eru tær meiri at kalla troyttandi.

Á fløguni hjá Whitney Houston eru fleir nýggjar duettir tiknar við. Eitt nú syngur Whitney bæði saman við Enrique Eglesias og George Michael, og synd er at siga, at hesi løgini hava nógv uppá seg. Lurtarin situr fyri hvørja ferð eitt av hesum nýggju løgunum er liðugt, eftir við eini kenslu av at vera hildin fyri tað turra spott. Lítið av saft og kraft er í hesum nýggju løgunum, og synd er at siga at tey hoyra eini greatest hits fløgu til, uttan so, at ein slík skal innihalda eina rúgvu av fylli.

Tvey avgerandi umfør hósdagin og sunnudagin

Hósdagin og sunnudagin hava landskappingardystir verið í kvinnudeildini, og nú byrjar ein spakuliga at síggja, hvussu endaspælið fer at síggja út, hóast alt enn kann henda



Annika Godtfred gjørdi rættuliga um seg móti GÍ, har hon skeyt fýra av fimm málum

HEINI Í SKORINI

Vit fara fyrst í holt við dystirnar hósdagin og sunnudagin í bólki A. Dysturin sum tey flestu hugdu at við spentum eygum hósdagin, var toppdysturin í bólki A millum VB og HB, men tíverri bleiv hesin dysturin av ongum, og dysturin er fyribils útsettur. Hesin dystur verður uttan iva sera spennandi, av tí at hetta eru klárt tey bestu liðini í bólki A.

AB spældi enn ein undirhaldandi dyst hósdagin, har tær tóku ímóti Skála, sum er ein av kappingarneytum teirra um triðja plássið í bólki A. AB byrjaði sera væl og komu á odda 2-0 við málum frá Elin Kathrinu Haraldsen og Lív Mikkelsen. Men síðani vaknaðu skálakvinnurnar av álvara, og Borglis Fagradal skeyt heili fimm mál. Hitt málið skeyt Anna Berg Danielsen, og hon legði eisini upp til fleiri av málunum hjá Borglis. Endaliga úrsliti gjørdist sostatt 6-2 til Skála, sum nú av álvara hevur sett kós móti endaspælinum.

Suðuri í Sumba tók Sumba hósdagin móti GÍ í einum dysti, har vindurin darvaði spælinum sera nógv, og m.a. var sagt, at málspørkini komu nóg illa út um brotsteigin!! Dysturin endaði 2-1 til GÍ, og vóru hetta trý týdningarmikil stig fyri GÍ. Málið hjá Sumba skeyt Maibritt úr Hørg, og hjá GÍ skeyt Linda Hansen eitt mál, meðan hitt var eitt sjálvmál.

Sunnudagin leiktu HB og GÍ í Havn, har serliga Annika Godtfred setti sín dám á dystin. Fyrsta málið gjørdi Eydna Skaale, og síðani fór Annika í gongd og skoraði ikki minni enn fýra mál, harav eitt upp á brotsspark. HB vann enn ein sannførandi sigur, og tær vera uttan iva ringar at syfta í ár.

Í Sumba spældu Sumba og AB, og var hetta ein avgerandi dystur um triðja plássið í bólkinum. Hálvleiksstøðan var 0-0, meðan bæði liðini fingu hvør sítt mál í seinna hálvleiki. Sumba kom framum við einum flottum frísparki frá 18 ára gomlu Sunnevu Kjærbo, men tá eitt korter var eftir at leika, javnaði Arngerð Diana Hansen fyri AB, so at liðini fingu hvør sítt stig.

VB var á Skála og vitjaði sunnudagin, og dysturin endaði við, at VB vann heilt 13-0. VB vísti seg frá síni sterkastu síðu, og serliga skaraði Guðrun í Lágabø framúr, og hon skeyt ikki minni enn sjey mál. Síðani fekk Halltóra Joensen tvey, Laila Jespersen eitt, meðan vit tíverri ikki fingu at vita, hvørjar skutu hini trý málini. Rannvá Augustinussen kom í øllum førum á máltalvuna, men hvussu nógv hon gjørdi, fingu vit tíverri ikki at vita, men vónandi kunnu vit viðmerkja tað seinni.

Bólkur B

Í bólki B spældu NSÍ og KÍ ein sera spennandi dyst hósdagin í Runavík, hóast KÍ hevði stóra leikliga yvirvág. Í hálvleikinum stóð á jøvnum 3-3, meðan KÍ í seinna hálvleiki megnaði at fáa sigursmálið, sum gav teimum trý stig. Málini hjá NSÍ skutu Elsebeth Hansen, Maibritt Olsen og toppskjúttin hjá NSÍ, Irdi Hansen. Hjá KÍ var Rannvá Andreassen sum ikki einaferð upp á spæl, og hon skeyt hattrick, meðan Mariann Joensen skeyt eitt mál fyri oddaliðið í bólki B.

Á Sandi fekk EB/Streymur uppiborið hálað sín fyrsta sigur í ár í land, og vunnu tær hósdagin 2-1 á B71. Sunneva Vesturdal og Judith í Skorini skutu málini hjá EB/Streymi, og málið hjá B71 fekk Mathea Olsen. EB/Streymur hevur nú fingið fýra stig, og halda tær á við forminum tær hava havt, kunnu tær væl gera seg galdandi um triðja plássið, hóast tað verður ringt at koma framum NSÍ.

Sunnudagin leikti EB/Streymur so aftur, og var hetta á heimavølli móti B36. EB/Streymur fekk ikki eitt stórtap frá havnarkvinnunum sum seinastu ferð, hesi bæði liðini møttust, og endaliga úrsliti gjørdist tepurt 2-0 til havnarliðið. Hálvleiksstøðan var 0-0, og málini hjá B36 gjørdu Sólgerð Viderø og liðskiparin Sólvá Joensen.

Hin dysturin sum átti at vera leiktur sunnudagin, var dysturin millum KÍ og B71 í Klaksvík. Men B71 kvinnurnar hava so nógvar skaddar leikarar í løtuni, og við einum smølum hópi ber ikki til at manna lið, tá so nógvar eru skaddar. So hesin dysturin er útsettur, men nær hann verður, er ikki avgjørt enn.

Seinast kvinnufótbólturin varð umrøddur, høvdu vit ikki fingið fatur á, hvør skoraði málið hjá EB/Streymi móti NSÍ sum endaði 1-1. Vit kunnu hervið staðfesta, at Maria Niclassen skoraði málið hjá EB/Streymi.

Úrslitini hósdagin og sunnudagin vóru hesi:

Bólkur A:

AB-Skála 2-6
AB: Elin Kathrina Haraldsen 1, Lív Mikkelsen 1.
Skála: Borglis Fagradal 5, Anna Berg Hansen 1.

Sumba-GÍ 1-2
Sumba: Maibritt úr Hørg 1.
GÍ: Linda Hansen 1, sjálvmál 1.

HB-GÍ 5-0
HB: Annika Godtfred 4, Eydna Skaale 1.

Sumba-AB 1-1
Sumba: Sunneva Kjærbo 1.
AB: Arngerð Diana Hansen 1.

Skála-VB 0-13
VB: Guðrun í Lágabø 7, Halltóra Joensen 2, Laila Jespersen 1, Rannvá Augustinussen ?, vita ikki hvør annar skoraði, viðmerkt seinni.

Bólkur B

B71-EB/Streymur 1-2
EB/Streymur: Judith í Skorini 1, Sunneva Vesturdal 1.
B71: Mathea Olsen 1.

NSÍ-KÍ 3-4
NSÍ: Maibritt Olsen 1, Irdi Hansen 1, Elsebeth Hansen 1.
KÍ: Rannvá Andreassen 3, Mariann Joensen 1.

EB/Streymur-B36 0-2
B36: Sólgerð Viderø 1, Sólvá Joensen 1.

Málstindurin

Halltóra Joensen	VB	20
Rannvá Andreasen	KÍ	13
Annika Godtfred	HB	11
Rakul N. Joensen	B36	10
Eyðfríð Christiansen	HB	9
Malena Josephsen	KÍ	8
Laila Jespersen	VB	8
Guðrun í Lágabø	VB	7
Maria Johnson	HB	6
Elin Kathrina Haraldsen	AB	5
Irdi Hansen	NSÍ	5
Borglis Fagradal	Skála	5
Maria Mikkelsen	AB	4
Elin Højsted	B71	4
Kristbjørg Isaksen	GÍ	4
Vivian Thorleifsson	HB	4
Mariann Joensen	KÍ	4
Gurið Mortensen	VB	4
Rannvá Augustinusen	VB	4
Arnbjørg Danielsen	B36	3
Elsebeth Jónsson	B36	3
Laila Enghamar	B36	3
Sólvá Joensen	B36	3
Súsanna Hansen	B36	3
Heidi Jacobsen	GÍ	3
Lív Mikkelsen	AB	2
Sólgerð Viderø	B36	2
Sólrun Olsen	B71	2
Maria Niclasen	EB/Str.	2
Linda Hansen	GÍ	2
Eydna Skaale	HB	2
Elsa Maria Simonsen	KÍ	2
Vivian Bjartalíð	KÍ	2
Maibritt Olsen	NSÍ	2
Sóleyð Einarsson	NSÍ	2
Sunneva Kjærbo	Sumba	2
Sóleyð Holm	VB	2

adidas

Støðan, bólkur A

		dystirv	j	vunnin	tapt	tmál	mál munur	stig
1	HB	7	7	0	0	35	2	33	21
2	VB	7	6	0	1	52	5	47	18
3	Skála	7	3	0	4	12	44	-32	9
4	GÍ	7	2	1	4	13	23	-10	7
5	AB	6	1	2	3	12	32	-20	5
6	Sumba	8	0	1	7	6	24	-18	1

Støðan, bólkur B

		dystirv	j	vunnin	tapt	tmál	mál munur	stig
1	KÍ	5	5	0	0	34	7	27	15
2	B36	6	5	0	1	35	11	24	15
3	NSÍ	6	2	1	3	12	22	-10	7
5	EB/Str.	7	1	1	5	4	29	-25	4
4	B71	6	1	0	5	9	25	-16	3